# Farloyvisstarv
# Skrivstovufólk til Sjóvinnustýrið

Farloyvisstarv sum skrivstovufólk í Sjóvinnustýrinum er leyst at søkja fyri starvsfólk, ið fer í barnsburðarfarloyvi.

## Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum

- Journalisering
- Arkivering
- Kundaavgreiðsla
- Málsviðgerð av viðurkenningarprógvum til útlendsk sjófólk um borð á føroyskum skipum
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

## Útbúgvingar- og førleikakrøv

- Útbúgving innan skrivstovuyrkið ella samsvarandi útbúgving

## Vit vænta, at tú

- ert fyrikomandi, árbyrgdarfull/ur og tænastusinnað/ur
- ert væl skipað/ur
- hevur góð evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni og ert arbeiðssom/samur
- hevur góðan telduførleika og gott hegni at seta teg inn í nýggjar telduskipanir
- hevur góðar málsligar førleikar í skrift og talu, bæði í føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

## Setanartreytir

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið, Hoyvíksvegur 5, Tórshavn.
Starvið verður sett 1. mars 2018.

## Umsóknir

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. jan. 2018.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast Christel Christoffersen, deildarleiðara, á tlf. 355600.

Umsóknir skulu sendast sum teldubræv til: *christelc@fma.fo*